gult cyan magenta svart

Sámiskur tjóðardagur

SÁMAR
Birgir Kruse

Í dag er sámiskur tjóðardagur. Hóast sámiska flaggið ikki er at síggja í norrønum høpi, varð flaggið í 1986 góðkent millum sámar á stevnu í Åre í Svøríki. Hetta flaggið er ein bláur og reyður rundingur, sum ímyndar sólina, sum fer gjøgnum litirnar blátt, reytt, grønt og gult. Frammanundan varð eitt annað flagg nýtt. Tað flaggið seymaði ein føroyskur rithøvundur á norrønari bókastevnu í Føroyum.

Tað var í 1986, at hin 6. februar varð kosin tjóðdagur sáma. Eisini sangurin »Isak Sabas Sámisogá lavlu«, sangur sámafólksins, varð við hetta høvið góðkendur sum tjóðsangur.

Í 1989 setti norski Ólavur kongur fimti fyrsta fólkavalda sámiska tingið í Noregi. Tingið varð kallað Sámatingið og hevur heimstað í býnum Karasjok. Sámatingið arbeiðir við sámiskum máli og mentan og samstarvar eisini við upprunafólk kring knøttin. Síðani 1953 høvdu sámar tó hildið ting, fyrstu ferð í Jokkmokk. Í 1994 vórðu sámar úr Norðurameríka eisini bodnir við.

Fyrstu ferð vit lesa um sámar er hjá rómverska søgumanninum Tacitus í bókini »Germania« í árinum 98. Teir verða umrøddir sum framúr veiðimenn. Hesa søgu fingu vit eisini prógvaða á filmsløriftinum, tá Niels Gaup í 1989 gjørdi filmin »Vegvísin«, sum hetta árið kappaðist um Oscar virðislønina. Tá hann var heiðursgestur á filmstevnu í Føroyum hetta árið, varð ikki loyvt at brúka sámiska flaggið. Tað endaði sum veggprýði í útvarpshøllini.

Tað var í víkingatíðini, at sámar fyrstu ferð vórðu kravdir eftir skatti. Í 18. og 19. øld varð Sámaland skift millum Danmark-Noreg, Svøríki og Russland. Fyrra partin av 18. øld varð nógv gjørt í Noregi at fáa sámar at taka við kristnari trúgv og at sleppa uppruna trúnni og teim sonevndu heidnu siðunum. Síðst í 19. øld avgjørdi Stórtingið, at sámisk børn skuldu fáa læru í norskum máli, heldur enn sámiskum. Beint eftir aldarskiftið, í 1902, var lóg ásett, sum gjørdi tað trupult hjá sámum at keypa jørð. Ikki fyrr enn eftir seinra verðaldarbardaga varð hesin miðvísi týningarpolitikkur sleptur.

Frá Tróndheimi í suðuri til Kolanesið í norðuri, kann sámiska málið skiftast sundur í 9 ymsar dialektir. Onkrar so ymiskar, at umseting má til. Hóast sámar eru eins truplir at skráseta sum føroyingar í Danmark verður sagt, at í Noregi búgva 30.000 sámar, í Svøríki 17.000, í Finnlandi 6.000 og í Russlandi 2.000.

Úti í heimi eru fleiri tónleikarar úr Sámalandi kendir. Serliga innan sonevndan »world music«, sum antin traditionelt ella modernistiskt bjóðar fram staðbundnan tónleik. Millum hesi eru Mari Boine og Wimme Saari. Eisini sámiski sjónleikarabólkurin Beaivvás er víðakendur.

Minnislutir úr Sámalandi.

Modellmynd: Jens Kristian Vang

5000 fólk mótmæltu skakandi drápi:

Rasmisman má steðgast

Kurvaboltsstjørnan og hálvi føroyingurin Calix Blak helt í farnu viku røðu, tá 5000 fólk í Bergen mótmæltu óhugnaligum rasistiskum drápi í Noregi

RASISMA
Eyðun Klakstein

– At onkur tilvildarligur gevur mær fingurin og kallar meg nekara, leggi eg lítið í, men eg haldi, at tað er umráðandi, at vit eisini gera vart við okkum, so rasisman ikki fær fríar teymar, sigur Calix Blak, sum í farnu viku helt røðu fyri 5000 fólkum í Bergen.

Mynd: Bergensavisen

Norska samfelagið er skakað av drápinum á unglingin Benjamin Hermansen, sum verður sagt at verða eitt rasistiskt dráp.

Í farnu viku vóru mótmælisgongdir kring alt Noregi, har fólk gjørdu vart við, at tey góðtóku ikki slíka harðliga framferð í norska samfelagnum.

Í Bergen vóru eini 5000 fólk við í eini stillari kyndlagongu í miðbýnum, og umframt borgarstjóran í Bergen røddi myrka kurvaboltsstjørnan Calix Blak Ndiaye, sum hevur føroyska mammu og brúkti stóran part av barnaárunum í Klaksvík.

– Hetta hava verið nakrir syrgiligir dagar, men um vit standa saman, eru vit sterk, segði Calix millum annað í síni røðu til tey mongu fólkini.

Merkt rasismuna

Calix Blak er mest lovandi kurvaboltsspælarin í Noregi, og í januar mánaði var hann valdur besti spælarin í norsku kappingini.

Mamman er úr Klaksvík og pápi hansara úr Senegal, og seinastu árini hevur Calix búð saman við familju síni í Bergen.

– Eg varð biðin um at halda eina røðu í sambandi við kyndlagongdina, og tað mátti eg siga ja til. Hetta er eitt ógvuliga týðandi mál, sigur Calix á góðum føroyskum norðanmáli.

– Eg havi sjálvandi merkt nakað til rasismu, men tað hevur hvørki verið ógvusliga ella beinleiðis. At onkur tilvildarligur persónur gevur mær fingurin og kallar meg nekara, leggi eg lítið í, men eg haldi, at tað er umráðandi, at vit eisini gera vart við okkum, so rasisman ikki fær fríar teymar, sigur Calix.

– Tað er vandamiklið, um fólk eru líkagyldug. Tað mugu vit ikki verða, og tí er um kyndlagongum, men sanniliga eisini í gerandisdegnum.

Tigandi meirilutin

Tað var tann tigandi meirilutin, sum gjørdi vart við eisini neyðugt, at fólk gera vart við seg bæði við slíkmótmælis- ella herróp at hoyra, tá tey 5000 fólkini savnaðust í býinum. Talan var hinvegin um eina friðarliga markering, har fólk við kyndlum mótmæltu gongdini í Noregi.

Bæði yngri og eldri vóru við í tiltakinum, sum fekk seg í Noregi í farnu viku.

Í Bergen vóru hvørki nógv størri undirtøku, enn fyrireikararnir frammanundan høvdu roknað við.

– Eg var rættilig nervøsur, áðrenn eg skuldi halda røðuna, tí eg eri ikki vanur við júst hetta. Men tá eg var byrjaður at tosa var eingin trupulleiki, sigur Calix Blak.

– Nú aftaná eri eg ómetaliga glaður fyri, at eg var við í tiltakinum, og eg havi eisini fingið nógvar positivar reaktiónir.

Calix Blak ger í løtuni hertænastu, men hann venur kurvabólt minst tvær ferðir um dagin, og um vikuskiftið eru dystir á skránni.

Nú sendir Lindin í Klaksvík

Leygardagin varð sendarin hjá Lindini á Brúnaskarði tendraður

ÚTVARP
Eyðun Klakstein

Seinnapartin leygardagin fór kristiliga útvarpsrásin Lindin at senda umvegis Brúnaskarð í Klaksvik.

Lindin, sum hevur eitt ár á baki, hevur leingi arbeitt við at vaksa um lurtaratalið, og leygardagin var eitt rættiligt tak tikið í so máta.

Í sambandi við nýggja sendaran gjørdi Lindin nógv burtur úr sendingunum seinnapartin leygardagin, og sent varð eisini av Brúnaskarði, har borgarstjórin í Klaksvík var við at tendra sendaran.

Lindin sendir á 105,0 MHz, og frammanundan senda Útvarp Føroya og Rás 2 eisini í Klaksvík.

Lindin fer fyrstu tíðina at leiga seg inn í Studio Pegasus, tá rásin skal gera sendingar úr Klaksvík. Hetta gjørdi Lindin eisini leygardagin, tá gestir komu á gátt.